# Tveir rundir dagar

3. desember varð Sunnvá 70 – hon er yngst í flokkinum hjá Biritu og Edvard Lindenskov - í Rættará.

Í teimum árunum undan krígnum var Havnin ein onnur, enn hon, vit kenna í dag. At bjarga sær til hus og heim var ikki bara sum at siga tað.

Pápin var kyndari/motorpassari á Meiarínum, traðarmaður, røkti sjógvin, seyðin, sum vanliga var partur í húsarhaldinum hjá havnarfólki.

Sunnvá var einasta í syskinaflokkinum, sum gekk í Nonnuskúla, skúlin lá so tætt upp at Rabarbukvarterinum, har tey búðu.

So skjótt skúlin var av – ja longu í skúlaárunum, var Sunnvá von at taka hond í heima og at ansa børnum. Í Havn vóru altíð mammur einsamallar og máttu arbeiða út fyri at forsyrgja barninum.

Og skjótt eftir at skúlin var farin aftur um, fór hon í H. N. Jacobsen Bókahandil.

Hennara lívsstarv uttan fyri heimið var Bókahandilin á Vaglinum, og heilt hevur hon ongantíð slept, hon vaskar í Bókahandlinum í ein vissan mun enn – er manga løtuna í heiminum í Vallalíð. Tey heita javnan á hana at taka eina hond í, tá trot er á fólki.

Í 50'unum mundi vera á fyrsta sinni, at skótalið Sigmunds Brestissonar roynir seg við kvinnuligum leiðarum. Vit minnast Áshild Midjord, Sunnvu, Bjørg Matras, Ingrid Sondum. Tær mundu byrja við Úlvaungunum, sum smæstu skótarnir vórðu róptir.

Tær mundu byrja á Bryggjubakka. Nýggja skótahúsið var tá kanska komið í ljósmála oman fyri brúnna við Sjónleikarhúsið.



*Mikudagin í síðstu viku fylti Sunnvá Christiansen í Havn 70 ár. Hon helt dagin saman við svágrinum, Rólant Dal Christiansen, sum fylti 80 ár tveir dagar frammanundan*



*Sunnvá var við í Skótaliði Sigmunds Brestissonar*

Sunnvá var eisini í Róðrarfelagnum og í Ungmannadeildini, Losjuni.

Í 1957 fór hon á húsarhaldsskúla í Haslev, tær vóru 14 úr Føroyum, og halda tær enn saman og hittast við millumbilum. Allar búsettust í Føroyum.

Í 1961 giftust Sunnvá og Terje, tey festu búgv í Kjøpinhavn, Terje var stýrimaður við DFDS og búgva tey tá á Buddingevej í Søborg. Tey flyta heimaftur og seta búgv í Tórfinsgøtu í 1970, tey eiga børnini Rosa Birgithu, Kára og Sofus Edvard og í 1976 sá Hans Áki dagsins ljós.

Øll árini, Sunnvá starvaðist í Bókahandlinum, var hon trúgva hjálparfólkið hjá stjórafólkunum í Bókahandlinum, Hans og Kate Niclasen. Hann andaðist 75 ára gamal í 1969, og Kate á 91. ári 5. august í 1992.

70 ára føðingadagurin var nógv fólk í kaféteriuni í ítróttarhøllini á NABB.

Tað sermerkta var, at samstundis helt svágur hennara, Rólant, sum hevur búð í Íslandi síðani 1952, sín 80 ára føðingardag.

Rólant fylti 80 ár 1. desember. Konan og tvær døtur vóru komnar at halda dagin saman við Sunnvu.

Liðugur við realskúlan fer Rólant í læru í Sjóvinnubankanum, har var hann stutt, fer til sjós, um tað mundið hittast tey, íslendska stúlkan, sum er í læru hjá Jenny Rein, frisørdamuni á Áarvegnum.

Tey flyta til Reykjavíkar, og Rólant fer í læru sum jarnsmiður hjá verfaðir sínum. Og Rólant trívist framvegis í Íslandi, men vitjar rættiliga tíðan heim.

Vit ynskja føðingardagsbarninum hjartaliga tillukku við kempuárunum.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Poul Johannes Andreasen** fer til gravar úr Havnar kirkju leygardagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Poul Johannes, kunnu lata Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi eina gávu. Konta í Eik.

Vor kære far

**Kaj Arthur Petersen**

født den 4. marts 1918 i Tvøroyri, Suðuroyar
sov stille ind den 5. december 2008
efter et langt og aktivt liv

**Familien**

Bisættelsen finder sted fra Bispebjerg Krematoriesal
i København, onsdag den 17. december kl. 13.00

Lesið Sosialin - so eru tit við



## Ingrid Gerðisheim áttati 11. des. 2008

*Ótrúligt, men satt*
*mostir 80 ár*

*Tíðin flogin...*

*So stutt síðan*
*mostir var ung*
*vit vóru smá*

*Í stórbýnum settu tit búgv*

*Tvísporaðir vegir og høg fjøll*
*eitt fjálgt býarhjarta*
*umgyrt av lívi*

*Fótbóltsvøllur við skýli*
*8-horna kiosk*
*heimsins bestu kramarhús*
*kondittari á horninum*
*Svimjihøll og hitarúm*

*Hjá Arna, Heygabúðin, Skovs og Hopo*
*Kallsoyarstivlar, anorakkar og ketildragtir*
*Føroya Bjór og Dávavirkið*

*Út í Grøv*
*niðan á Kærlighedsstigen*
*Og síðan heim í Kráargøtu at spæla*

*Uttanfyri mostur´sa vakri urtagarður*

*Eitt lithav av blómum, rósutrøum,*
*og smalum gøtum*
*klæddar við ævintýrkendum skeljum*
*Vakrari grind og inngongd*
*gulir og reyðir flísar*
*sum søgdu*
*vælkomin børn*
*norður til mostur*

*Á grasplenuni var allur heimurin nær*
*lívið var summarferia*
*nýbakaðir bollar*
*mostir í kitli og turriklæði*
*ella*
*mostir í gulari baðihettu og bláari*
*svimjudragt*
*málaði, vaskaði, lúkaði og bakaði*
*ella*
*liggjandi í dreyma heingjukoyggjuni*
*meðan vit vassaðu og tvassaðu*
*í bláa og reyða plastikhavinum*

*Takk mostir*
*fyri minnisríkar løtur*
*tær ríkaðu*
*okkara barnaverð*

*Gleðiligt var tað*
*at tit fluttu suður*

*Nú vesturskynið lýsir*
*á tykkara lívsvegi*
*røsk enn tit eru*
*og røkin tit bæði*

*Vakurt er heim tykkara*
*innan og uttan*
*eydnu og gleði*
*tit bæði*
*á áttatiára degi*

**Ynskja við takkarkvøðu**
**Systurbørn tíni**